Nú skulu bestu leikararnir kjósast

Flogbóltssamband Føroya skipar aftur í ár fyri Gallaveitslu fyri flogbóltsleikarunum og eins og í fjør verður hetta høvið brúkt til at kjósa bestu flogbóltsleikararnar á teimum ymsu plássunum

Nú landskappingin er av, skulu bestu leikararnir í flogbólti finnast. Gallaveitsla verður 6. apríl á Hotel Føroyum, har leikararnir við atkvøðugreiðslu finna besta leikaran
Savnsmynd: Álvur Haraldsen

FLOGBÓLTUR
Sveinur Tróndarson

Seinastu árini hevur eitt nýtt fyribrigdi tikið seg upp í føroyskum ítróttarhøpi. Tað eru gallaveitslurnar, sum eru farnar at stinga seg upp, beint eftir at tær ymsu landskappingarnar eru endaðar og meistararnir eru kosnir.

Undirtøkan til hesar veitslurnar hevur verið góð og tað má takast sum eitt tekin um, at tørvur hevur verið á eini slíkari veitslu tá kappingarárið er av.

Í fjør var Flogbóltssamband Føroya á fyrsta sinni vertur fyri eini slíkari gallaveitslu, og tiltakið var so væl eydnað, at avgjørt er at endurtaka tað í ár.

Veitslan er tí sett á skránna at vera á Hotel Føroyum tann 6. apríl og tey, sum hava hug at vera við, skulu boða frá luttøku hjá FBF í seinasta lagi fríggjakvøldið 22. mars klokkan 20, verður sagt úr Flogbóltssambandinum.

Kostnaðurin fyri gallaveistluna í ár er 225 krónur. Tað er hálvthundrað krónur minni enn í fjør. Tey, sum hava boðað frá luttøku, skulu rinda atgongupeningin á konto hjá Flogbóltssambandinum í seinasta lagi mánadagin 25. mars. Tá FBF hevur skrásett inngjaldið verða atgongumerkini send við postinum.

Gestirnir á gallaveitsluni fáa, umframt eitt gott kvøld, ein góðan bita. Matarlepin sigur frá, at gestirnir fáa royktan laks við asparges, salat og heimabakaðum breyði, lambssteik við grønmeti og sós av soðnum, og íslagkøku og kaffi omaná. Aftaná borðhaldið verður dansur.

Tiltakið byrjar klokkan 19.30 og dyrnar verða stongdar klokkan 20.00.

Kjósa bestu leikararnar

Samstundis sum gallaveitslan í fjør var tann fyrsta av sínum slagi, var tað eisini fyrstu ferð, at føroysku flogbóltsleikararnir kjósaðu teir bestu leikararnar á teimum ymsu plássunum.

Tað hevur stóran týdning at fáa viðurkenning fyri tað ein ger, og í so máta er flogbóltur einki undantak.

Tað besta av øllum í sambandi við ársins leikaraheiður er, at tað eru hinir leikararnir í meistaradeildini, sum kjósa bestu leikararnar og tað merkir, at tað er ein »serkøn« meting sum stendur aftan fyri heiðurin.

Øll liðini í meistaradeildini hava fingið atkvøðuseðlar sendandi í postinum, og hesir seðlar skulu fyllast út og sendast FBF aftur í seinasta lagi mánadagin 25. mars.

Í fjør vóru Helga Nordendal úr Drátti og Rúni Weihe úr Fram kosin bestu leikarar, men í øllum føri hjá kvinnunum skal nýggjur leikari kjósast. Helga hevur nevniliga ikki leikt í ár og kemur tí ikki upp á tal, men tað eru nógvir aðrir góðir leikarar at velja ímillum. Hjá monnum verður spennandi at sígga um tað fer at eydnast Rúna at endurtaka bragdið frá í fjør.

Umframt at velja ársins leikara skulu flogbóltsleikararnir kjósa besta álopsleikara, besta blokkleikara, besta verjuleikara og besta hevara. Harumframt skalt ársins stjørnuskot kjósast og – sum nakað nýtt – skal eisini ársins venjari veljast.

Vinnararnir fáa allir steyp til ognar til minnis um heiðurin.

FM-kapping fyri tey yngru

Um vikuskiftið verður seinasta flogbóltskappingin hjá teimum yngru í hesum kappingarárinum, og tá hon er farin aftur um vita vit, hvørji lið eru Føroyameistarar í teimum ymsu deildunum

FLOGBÓLTUR
Sveinur Tróndarson

Havnin verður um vikuskiftið á tremur við ungum flogbóltsleikarum, sum fegnir vilja gerast Føroyameistarar. Kappingin, sum er tann seinasta á árinum, verður leikt í Gundadalshøllini og øllum skúlunum í høvuðsstaðnum, og tá hon er farin aftur um, eru Føroyameistararnir í teimum ymsu deildunum funnir.

At tað eru nógv sum hava fingið hug at leika flogbólt sæst best við, at ikki færri enn 93 lið hava boðað frá luttøku, og tað ger, at allir dagarnir í vikuskiftinum skulu í brúk. Hetta fær ikki fyrireikararnar at missa móti, heldur tvørturímóti, tí tað er júst ungdómurin, sum er framtíðin hjá flogbóltinum eins og hjá hinum ítróttargreinunum.

Kappingin í Havn er sum sagt tann seinasta, og tá hon er liðug vera FM-vinnararnir í teimum ymsu deildunum kosnir. Nú er tað kortini ikki so, at FM-vinnararnir av sær sjálvum eru teir sum vinna kappingina í Havn. Í fjør avgjørdi aðalfundurin hjá Flogbóltssambandinum, at ein nýggj stigaskipan skuldi takast í nýtslu. Henda skipan ber í sær, at liðini hava fingið stig í hinum trimum kappingunum sum verið hava, og tey stigini hava tey við sær í finaluna.

Støðan í teimum ymsu deildunum er tann, at hjá gentum 10 er Fleyr á odda við 11 stigum. Teimum á baki kemur Nøvan við sjey stigum og Mjølnir við fýra. Hjá dreingjunum í sama aldri er Fleyr eisini á odda. Teir hava tíggju stig, meðan SÍ a og SÍ b hava seks stig.

Hjá gentum 12 er TB á odda við 10 stigum meðan Dráttur hevur átta. KÍF er nummar trý við trimum stigum. ÍF er á odda hjá dreingjum 12 við 11 stigum meðan TB hevur átta og SÍ sjey stig.

TB er eisini á odda hjá gentum 14. Her hava tær 10 stig meðan Mjølnir hevur fimm og KÍF fýra. Hjá dreingjunum í sama aldri hevur ÍF 10 stigum meðan Fleyr og SÍ hava fimm stig.

Sørvingar klára seg sera væl í kvinnuunglingadeildini. Her liggja tær á odda við sjey stigum meðan kollfirðingar hava fimm. Fleyr kemur á triðjaplássi við trimum stigum. ÍF er klárt á odda í mansunglingadeildini. Teir hava tíggju stig meðan Fleyr og SÍ hava fýra stig.

Sum sagt verður kappingin í Havnini um vikuskiftið sera drúgv, og skráin, sum annars er at sígga á heimasíðuni hjá FBF, sum eitur www.fbf.fo, sær annars soleiðis út:

Gentur 10 spæla í Kommunuskúlanum leygardagin 23. februar. Fýra bólkar eru og bólkur eitt og tvey byrja klokkan 9.45. Bólkur tvey og trý byrja umleið klokkan 13.30 og endaspælið verður umleið klokkan 16.30. Tað er Fleyr sum hevur ábyrgdina av hesi kappingini.

Dreingir 10 spæla á Læraraskúlanum og eisini teirra kapping verður leygardagin 23. februar. Tveir bólkar eru og fyrri bólkurin byrjar klokkan 9.45 meðan tann seinni byrjar umleið klokkan 13.15. Endaspælið verður umleið klokkan 16.30. Tað er Mjølnir sum hevur ábyrgdina av hesi kappingini.

Gentur 12 eru so væl mannaðar at tær spæla í tveimum skúlum. Bólkur eitt og tvey spæla í Hoyvíkar Skúla, meðan bólkur trý og fýra spæla á Studentaskúlanum. Byrjað verður samstundis og tað merkir, at bólkur eitt og trý byrja klokkan 9.45 og bólkarnir tvey og fýra byrja umleið klokkan 12.45. Tá hesir bólkar eru lidnir, vera fjórðingsfinalur spældar á teimum skúlum, sum bólkarnir eru staddir, og ikki fyrr enn hesir dystir eru leiktir savnast liðini til semifinalur og finalur í Hoyvíkar skúla.

Tað er SÍ sum hevur ábyrgdina av kappingini í Hoyvíkar Skúla meðan KÍF hevur ábyrgdina av kappingini á Studentaskúlanum.

Dreingir 12 spæla í Gundadalshøllini leygardagin og tað er ÍF sum hevur ábyrgdian fyri hesi kapping. Byrjað verður klokkan 13.45 og spælt verður á trimum vallum í senn.

Gentur 14 spæla eisini í Gundadalshøllini, men tær byrja klokkan 9.45. Eisini gentur 14 eru í trimum bólkum og eisini tær spæla á trimum vallum í senn. Tað er TB sum hevur ábyrgdina fyri hesi kapping.

TB hevur eisini ábyrgdina av kappingini fríggjakvøldið. Tá kappast dreingir 14, kvinnu- og mansunglingar og av tí at tað bara er ein bólkur í hvørjum av hesum aldursbólkum, verða teir avgreiddir á hvør sínum vølli í Gundadalshøllini. Kappingin byrjar klokkan 18 fríggjakvøldið.

Seinastu kappingarnar – tær vera sunnudagin – eru tær hjá dreingjum og gentum 16 ár. Dráttur stendur fyri kappingini hjá gentum 16, meðan Fleyr stendur fyri kappingini hjá dreingjunum. Hjá gentunum eru tveir bólkar meðan tað bara er ein bólkur hjá dreingjunum, og tað merkir at genturnar spæla á tveimum vallum samstundis.

Kappingin sunnudagin byrjar klokkan 13.00.

Níggju pør í finaluna

BRIDGE
Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen

FM pør semifinala

32 pør spældu við í FM semifinaluni fyri pør 16. mars. Spælt var í tveimum røðum, og komu 9 pør úr hvørjum raði víðari í finaluna, sum verður spæld 20. apríl í Bridgehúsinum í Havn. Kappingin gekk stak væl, kappingarleiðari var Símin Lassaberg, og við telduna syrgdi Jógvan Juel Rasmussen fyri, at tey røttu úrslitini komu upp á veggin at hanga. Byrjað var at spæla kl 13, og eftir 60 spøl kl 22 um kvøldið var greitt, hvørji 18 pør fóru í finaluna:

Rað A

1 Robert Langgaard - Eyðun Anthoniussen	85
2 Helgi Joensen - Eyðun Joensen	74
3 Heðin Mouritsen - Jóannes Mouritsen	73
4 Per Kallsberg - Dánjal Pauli Mohr	52
5 Magni Jøkladal - Árant Berjastein	50
6 Hallberg Arnfríðsson - Kaj Alstrup	46
7 Jógvan Ranghamar - Atli Hansen	30
8 Niels Nielsen - Bjarki Johannesen	14
9 Hanus Bærentsen - Steingrím Weihe	-7

Rað B

1 Marner Joensen - Dia Jacobsen	45
2 Arnbjørn Sivertsen - Hans Jacob Petersen	42
3 Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen	41
4 Gunnar Mouritsen - Fríðrik Heinesen	26
5 Jens Pauli G. Nolsøe - Høgni Hansen	25
6 Petur Annfinn Johannesen - Eilif Petersen	13
7 Carl Mikkelsen - Egil Helmsdal	7
8 Eyðun Jensen - Pól Joensen	4
9 Eyðun Jakobsen - Øssur Winthereig	-10

Vit skulu sígga eitt spæl frá FM semifinaluni.

Spæl A25
N/EV

	AJ1052 J5 AQ1098 4	
K973 83 KJ75 Q105		- KQ764 4 AK98763
	Q864 A1092 632 J2	

V	N	E	S
Petur A Johannesen	Hans J Petersen	Eilif Petersen	Arnbjørn Sivertsen
-	1sp	2hj	2sp
pass	3kl	4kl	4sp
5kl	pass	pass	D
pass	pass	pass	

Skeivar hendur eru ofta spennandi at melda, og fær hugflogið í gongd hjá spælarum. 2hj hjá Eilif er merkt av, at tað er parakapping - tað loysir seg betri at melda major kontrakt heldur enn minor. 3kl hjá Hans Jacob vísti singleton og inviteraði til útgang. Tá Eilif meldaði kleyvaran, hevði Petur Anfinn eina torføra avgerð. Hann hevði hampuliga góð kort og skuldi velja ímillum at stuðla kleyvaran hjá makkaranum ella at dupla 4sp. Teir vóru í hættuni, so hann metti tað vera best at melda útgang. Kanska er duplingin hjá Sunnan nakað hørð, men í parakapping skal man dupla ofta fyri at fáa gott úrslit. Norðan hevði eisini vístu eina sterka hond, og hansara pass til 5kl er eitt slag av kravpassi, ið biður makkaran dupla ella melda 5sp.

Útspælið var kl2. Eilif tók á borðinum, spældi hjartara til Q og ess, fekk kleyvara aftur, spældi hjartara til kongin og trumfaði ein hjartara. Nú vóru ikki fleiri trumfir eftir á borðinum, og mótspælið skuldi hava eitt stikk í hjartara afturat og fyri rú ess. Úrslitið var ein dupladur niður í hættuni, 200 til NS. Men tað gav umleið miðal, tí eitt par var farið tveir duplaðir niður í 6kl (500), og eitt annað par hevði roynt seg í 4hjD og fýra eftir hæli (1100).
Trumfur skal út fyri at seta 5kl.

Robert Langgaard og Eyðun Anthoniussen vunnu innleiðandi umfarið í rað A í bridge

Marner Joensen og Dia Jacobsen vunnu innleiðandi umfarið í rað B í bridge

Føroya Tele Cup

Tann 6. apríl verður skipað fyri tí stórstu parakappingini, ið hevur verið í Føroyum tey síðstu nógvu árini. Kappingin er væl stuðlað av Føroya Tele og hevur tískil fingið navnið Føroya Tele Cup. Allir peningurin, sum kemur inn frá Føroya Tele Cup, fer óskerdur til tey bæði føroysku landsliðini, ið skulu til Italia at spæla við í EM í juni.

Pláss er fyri 40 pørum til kappingina, sum verður spæld í Bridgehúsinum í Havn, og er seinasta freist at boða frá luttøku mikukvøldið 3. apríl, hjá Boga Simonsen 318811 (heima) 228596 (fartelefon) ella hjá Marjun Restorff 319142 (heima). Byrjað verður kl 10:00 um morgunin og spæld verða umleið 60 spøl. Kappingin verður skipað sum ein barometurkapping. Føroya Tele letur nógvar sera góðar vinningar til kappingina.

Holte heldur kósina

Holte IF, við Bárði B. Mikkelsen á liðnum, sær út til at vera komið aftur á beint. Seinasti dysturin í endaspælinum varð spældur leygardagin og hann endaði við sigri. Hjá føroysku kvinnum eydnaðist ikki at spæla seg í semifinalurnar

FLOGBÓLTUR
Sveinur Tróndarson

Her heima er kappingarárið í flogbólti endað fyri einari viku síðani, men soleiðis er ikki í Danmark har fleiri av okkara fremstu flogbóltsleikarum dagliga leika. Undan seinasta vikuskifti var longu greitt, at Bárður B. Mikkelsen og liðfelagar hansara í Holte longu høvdu leikt seg í hálvfinalurnar, men fyri at sleppa undan at hitta oddaliðið HIK Ålborg, skuldi Holte vinna dystin móti Skovbakken, sum eisini var komið víðari.

Úrslitið av dystinum var, at Holte vann við trimum settum móti tveimum og sigurin ber í sær, at Holte skal spæla semifinalu móti DHG úr Odense, sum gjørdist nummar tvey í endaspælinum.

Bárður Mikkelsen sigur úr Keypmannahavn, at talan gjørdist um ein sera spennandi dyst. Teir byrjaðu best og vunnu fyrsta sett, men tað tók ikki móti frá Skovbakken. Teir bardu seg manniliga inn aftur í dystin og tá tey bæði næstu settini vóru farin aftur um var Skovbakken framman fyri. Nú vistu Holte-leikararnir, at skuldu teir sleppa undan HIK í semifinaluni var neyðugt at vinna og tí tóku teir seg saman og vunnu fjórða sett sjálvt um Skovbakken hevði havt tríggjar matchbóltar við støðuna 24-21. Fimta sett endaði við greiðum Holte sigri og sostatt eydnaðist ætlanin við at sleppa undan HIK í semifinaluni.

Settúrslitini í Holte gjørdust annars 25-20, 23-25, 21-25, 26-24, 15-10.

Semifinalurnar verða leiktar bestar av trimum. Fyrsti dysturin verður leiktur um vikuskiftið og verður hann leiktur í Odense. Næsti dysturin verður leiktur vikuskiftið 4.-5. apríl og verður hann - sum skilst - sendur beinleiðis á nýggju ítróttarrásini Viasat Sport.

Sum vit søgdu frá seinast, høvdu eisini føroysku kvinnurnar møguleika at spæla seg í semifinalurnar. Hetta kundu tær gera við at vinna á Rosenlund Volley í seinasta heimadystinum. Tá tað samstundis vóru hesi bæði liðini sum togaðust um seinasta semifinaluplássið var greitt, at dysturin fór at gerast spennandi, og tað var júst tað hann gjørdist.

Tíverri fyri Alvildu Ólavsdóttir og Anniku Joensen var tað ikki við teimum sum vinnarum, og tí er kappingarárið liðugt fyri teirra viðkomandi.

Sum sagt gjørdist dysturin sera spennandi og javnur. Eitt nú í øðrum setti spældu liðini heilt upp til 30-28 áðrenn Rosenlund slapp avstað við sigrinum. Í triðja setti kom Frederiksberg aftur í aftur, men tað var bara stokkutur hiti, tí tey bæði seinastu settini vann Rosenlund.

Úrslitið hevði við sær, at Rosenlund fór avstað við tí seinasta plássinum í hálvfinaluni meðan Frederiksberg Volley sat eftir við ongum.